# Kunngerðablaðið A

2019 Givið út 2. mai 2019

Nr. 48 30. apríl 2019

**Kunngerð**
**um**
**siglingarbøkur**

Við heimild í § 68 og í § 71, stk. 2 í løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um starvsviðurskifti o.a. hjá sjófólki, sum broytt við løgtingslóg nr. 32 frá 28. apríl 2009 og løgtingslóg nr. 71 frá 30. mai 2011, verður ásett:

**§ 1.** Ein føroysk siglingarbók er skjalprógv fyri, at eigarin er føroyskt sjófólk sbrt. ásetingunum í ILO sáttmála nr. 108 um tjóðskaparlig samleikaskjøl sjófólksins, 1958.
*Stk. 2.* Sjóvinnustýrið útgevur siglingarbøkur.

**§ 2.** Fyri at fáa føroyska siglingarbók krevst, at umsøkjarin:
1) hevur heimarætt, og
2) er fyltur 16 ár, sbr. tó stk. 2.
*Stk. 2.* Persónar undir 18 ár skulu hava skrivligt loyvi frá tí, sum hevur foreldramyndugleikan, um, at viðkomandi kann fara í starv á sjónum.
*Stk. 3.* Siglingarbók kann í serligum føri útflýggjast persóni, sum siglir við føroyskt skrásettum skipum, hóast viðkomandi ikki lýkur kravið í stk. 1, nr. 1.

**§ 3.** Umsókn um siglingarbók skal latast Sjóvinnustýrinum. Serligt umsóknarblað skal nýtast, tá ið søkt verður um siglingarbók.

**§ 4.** Skipari skal eftir áheitan frá sjófólkinum útfylla og undirskriva siglingarbók sjófólksins við teimum neyðugu átekningunum.
*Stk. 2.* Siglingarbókin skal útfyllast týðiliga. Nøvn á skipum og býum mugu ikki styttast.
*Stk. 3.* Fyri starvsheiti, ið eru fevnd av manningarskjali, skulu einans nýtast tey í manningarskjalinum nýttu starvsheiti.
*Stk. 4.* Siglingartíðin skal verða førd sum virkin tænasta umborð.
*Stk. 5.* Í førum, har sjófólk ikki er umborð, tá ið siglt verður, skal dagfestingin fyri fráveruna skrivast í avmynstringarteigin, sum við eini vanligari avmynstring, sama hvør orsøkin er til, at sjófólkið ikki er umborð.
*Stk. 6.* Sambært § 71, stk. 3 í løgtingslógini má í siglingarbókini eingin viðmerking um háttalag sjófólksins í starvinum ella um revsing, viðkomandi hevur fingið, verða sett.
*Stk. 7.* Einans tann skipari, ið hevur útfylt siglingarbókina, ella Sjóvinnustýrið, hava loyvi at gera rættingar í siglingarbókina.

**§ 5.** Siglingarbókin kostar 200 kr. Um siglingarbókin skal sendast, verður harumframt kravt postgjald.

**§ 6.** Brot á § 4 verður revsað við sekt.
*Stk. 2.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

**§ 7.** Hendan kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, samstundis verður kunngerð nr. 114 frá 7. september 2009 um siglingarbøkur sett úr gildi.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 30. apríl 2019

**Poul Michelsen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen (sign.)